# **Daddan** hevur alt til børn og ung

**Daddan er elsti barnahandil í Føroyum, og drúgvu royndirnar og áhaldandi stríð fyri at hava dygdina í hásæti, kemur kundunum til góða**

**HANDIL**

Elsti barnahandil í Føroyum eitur Daddan, og handilin hevur meira enn 20 ár á baki. Núverðandi eigarin hevur havt handilin í eini 12-13 ár.

## Brúðarklæði

Sum helst einasti handil í landinum hevur Daddan brúðarklæðir til tey smáu. Tað vil eisini siga, at her fáast t.d. klædningar til smádrongir, og annars alt til tey smáu, tá tey skulu pyntast.

Daddan selur klæðir til børn og ung millum 0 og 16 ár.

Klæðini til børn millum 0-8 ár eru frá Møller & Co, ið er gott og gamalt danskt firma, ið hevur eini 100 ár á baki. Hetta eru góð klæði, og leggur Daddan eisini allan vegin dent á, at góðskan er í hásæti.

## Móti

Daddan hevur, umframt klæðir, ymiskt annað at bjóða, t.d. taskur, turrukløð, hárprýði og aðrar smálutir.

Barnamótin er, eins og hjá teimum vaksnu, skiftandi. Mótin skiftir fleiri ferðir árliga, og longu tá talan er um klæði til hálvt ára gomul børn, kemur mótin inn í myndina.

Og sjálvandi er mótin av týdningi, tá talan er um klæðini til tannáringarnar, og har skiftir mótin ofta.

## Litir

Litirnir í summar eru fyri tey eldru børnini ljósablátt, gult og annars ljósir litir. Hjá drongjunum eru tað litirnir gult og svart, ið eru frammi, og rigga hesir sera væl saman.

Hjá særru børnunum eru tað dempaðir litir, ið eru frammi í summar, meðan t.d. turrikløðini eru í sterkum litum.

## Kend merkir

Daddan umboðar kend merkir, t.d. Spiderman, har gummistivlar og annað er at fáa.

Eisini umboðar Daddan góða gamla merkið Viking, ið hevur gummistivlar, regnklæði og annað.

Onnur kend merki eru t.d. Next-level, Minymo og Grunt. Daddan hevur stutt sagt alt til børn millum 0 og 16 ár.

## Kring alt landið

Daddan á Hálsi í Havn hevur broytt hølini fyri stuttum og nýggj merkir eru komin.

Talan er um handil, ið umboðar breitt úrval, og plássið er gott í teimum 350 fermetra stóru hølunum.

Daddan sendir kring alt landið.

Til ber at vitja www.daddan.net


















